# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# JØRGEN SUM FULLVELDISLØGMAÐUR

Hóast onkur kanska hevði væntað ella vónað, at ein rættilig politisk orrusta fór at spyrjast burtur úr, nú Javnaðarflokkurin spældi tvørur eina løtu og hótti við ikki at velja Jørgen Niclasen til formann í fíggjarnevndini, so er kortini alt aftur, so sum tað eigur at vera.

Hetta var bert ein roynd hjá Javnaðarflokkinum at vísa vøddar, nú Jørgen Niclasen og Fólkaflokkurin tóku bæði løgmann og samgongufelagar av ræði við at byrja samanlegging av Fiskimálaráðnum og Uttanríkisráðnum.

Javnaðarflokkurin hevur boðað frá, at hann kortini ikki fer at bróta samgonguavtaluna um, at Fólkaflokkurin eigur formannin í fíggjarnevndini.

Fríggjadagin skrivaðu vit á hesum stað, at um løgmaður hevði itið Atli Dam ella Anfinn Kallsberg, so hevði slíkt hent, tí eingin hevði torað at víst so lítla respekt fyri løgmanni, sum Fólkaflokkurin vísir Kaj Leo Johannesen í hesum máli. Og tað er tí, at alt ber til, og at einki fær avleiðingar.

Vit skilja væl, at Fólkaflokkurin er í djúpari kreppu. Hóast veljarakanningar geva Javnaðarflokkinum ringastu undirtøkuna síðani 1932, so hevur Fólkaflokkurin størri organisatoriskar trupulleikar, sum krevja eina stekra og dugnaliga leiðslu. Fleiri lyklapersónar hava vent flokkinum bakið og eru farin at reka virknan politikk í øðrum flokkum. Tað síðsta var, at Poul Michelsen fór úr Fólkaflokkinum og bleiv leysgangari á tingi.

Um Poul Michelsen ger leysasøgurnar til veruleika og stovnar ein nýggjan borgarligan fullveldisflokk saman við enn fleiri virknum fólkafloksfólkum, sum hava ella fara at venda flokkinum bakið, og við borgarligum fullveldisfólkum, sum halda Tjóðveldi vera ov vinstravent, so fær Fólkaflokkurin koyrilin enn meira at merkja. Tá kann hann koma í eina støðu, sum minnir um ta støðuna, sum Javnaðarflokkurin kom í í 1994, tá fleiri grundstuðlar í Javnaðarflokkum vendu flokkinum bakið og stovnaðu



Verkamannafylkingina. Tá misti Javnaðarflokkurin so nógva undirtøku, at tingfólkatalið fór niður í helvt – og hesi sár stríðist flokkurin við enn.

Tí er tað ein reellur trupulleiki, sum Jørgen Niclasen situr við. Spurningurin er so bara, um hann klárar at profilera flokkin meira í fíggjarnevndini enn í Uttanríkisráðnum, ella um hann fer at brúka tíðini upp á at profilera seg enn meira við at vera í andstøðu til verandi samgongufelagar til tess at tekkjast Tjóðveldinum, kyrra viðhaldsfólkini hjá Poul Michelsen – fyri á tann hátt at gera seg kláran sum næsta fullveldisløgmannin.

**Jørgen Niclasen vil profilera seg í fíggjarnevndini**

## Anfinn fær 34.345 í pensjón

Anfinn Kallsberg er tann fyrsti løgmaðurin, sum fer frá við hægstu pensjón. Hann fær 34.345 krónur í pensjón, nú hann hevur lagt frá sær sum politikari.

Eftir at fullveldissamgongan varð skipað í 1998, samtykti løgtingið mundandi broytingar í lønar- og eftirlønarviðurskiftum hjá politikarum. Eitt nú var løgtingslønin hækkað mundandi, samstundis sum pensjónirnar hjá teimum, sum tá sótu á tingi, vórðu munandi bøttar.

Fyri at vinna tær fulla eftirløn sum landsstýrismaður, so krevst bara, at tú hevur sitið átta ár í landsstýrinum. Fyri at vinna fulla eftirløn sum løgmaður, so krevst bara, at tú hevur verið løgmaður. Ein dagur er nóg mikið, bara tú samanlagt sum løgmaður og landsstýrismaður hevur sitið í átta ár. So fært tú 60% av løgmanslønini.

Anfinn Kallsberg kann tí sum tann fyrsti løgmaðurin fara frá við fullari pensjón, hóast hann ikki er 67 ár. Tí um aldurin pluss tvær ferðir starvsaldurin er meira enn 95, so hevur tú sum løgtingsmaður, landsstýrismaður ella løgmaður rætt til fulla pensjón sum 60 ára gamal. Anfinn Kallsberg kann tí sum 63 ára gamal leggja frá sær og fáa slakar 35.000 krónur í pensjón. Men hann hevur eisini verið fólkatingsmaður í fýra ár, og frá tí starvinum hevur hann eisini rætt til eftirløn sum 60 ára gamal. Tá hann fyllir 67 fær hann bæði samhaldsfasta og fólkapensjón, so hann hevur einki at óttast í so máta.



Tann 19. apríl fyllir Jóannes Eidesgaard 60 ár. Tá fær hann somu rættindi sum Anfinn Kallsberg pensjónini viðvíkjandi.

Tað er ikki gott at vita, hví politikarar skulu hava so nógv betur eftirlønartreytir, enn fólk annars hava. Men ein veruleiki er, at tað er løgtingið, sum fult og heilt ger, hvussu góðar lønar- og eftirlønartreytir politikarar skulu hava. Kanska tað er forklár-ingin...?



**Til reiðar til Oyggjaleikir**

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 25



**Húsakeyp og vantandi lóggáva**

BJØRT SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 26

## Tríggir fáa hægri løn enn Kaj Leo

Teir tríggir landsstýrismenninir, Jóannes Eidesgaard, Johan Dahl og Jacob Vestergaard fáa allir hægri løn enn løgmaður, Kaj Leo Johannesen.

Teir tríggir landsstýrismenninir, sum allir búgva í Suðuroyar, fáa 64.560,08 krónur í løn. Harav eru 13.506,91 krónur skattafrítt kostnaðarendurgjald og 2.349,03 krónur skattafrítt borðfæ.

Løgmaður fær 64.289,49. Harav er 7.047,09 krónur skattafrítt borðfæ. Av tí at løgmaður býr í Havn fær hann einki kostnaðarendurgjald.

Rósa Samuelsen, sum býr í Sandavági, fær 62.798,31 kronur í løn. Hennara kostnaðarendurgjald er 11.745,14.

Helena Dam á Neystabø, Aksel V. Johannesen og Annika Olsen búgva øll í Havn, og tí fáa tey einki borðfæ. Tey fáa tí »einans« 51.053,17, harav 2.349,14 krónur eru skattafrítt borðfæ.

Jørgen Niclasen, sum í síðstu viku fór frá sum landsstýrismaður, fær sína grundløn næstu seks mánaðirnar, 48.704,14 krónur. Hann fær eisini løn sum løgtingsmaður og formaður í fíggjarnevndini.

## Veit ikki um hann vil hava tvær lønir



Sosialurin hevur spurt Jørgen Niclasen, um hann fer at taka ímóti dupltari løn næstu seks mánaðirnar, men tað veit hann ikki, um hann fer at gera.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*